LM-099/2023

Annika Petersen Fylgiskjal 71

Fra: Jógvan Kruse <jogvan@sunda.fo>
Sendt: 23. februar 2024 14:07
Til: VMR-Journal
Emne: Hoyringarsvar, løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu, Jógvan Kruse borgarstjóri

Til Landsstýrismannin Høgna Hoydal

Eg skal byrja við, at hetta er eitt hoyringarsvar frá mær, og mær eina, og talan er meira um onnur viðurskiftið, ferðavinna hevur við sær í Sunda kommunu enn "gongd í haga".
Væl vitandi, at tað eru onnur Landsstýrisfólk sum umsita viðurskiftini niðanfyri, fari eg at heita á teg um at hava tað við á Landsstýrisfund, saman við lóggávuni um burðardygga ferðavinnu.

-

Samferðslunetið í Sundalagnum, tá farið verður av høvuðsleiðini út á farleiðirnar til Saksunar, til Tjørnuvíkar og til Gjáar, eru undir stórum og vaksandi trýsti, við øktu ferðavinnuni.
Ferðslan á hesum farleiðum er økt heilt munandi seinastu árini, bæði við ferðamannabussum men einamest við leigubilum.
Kommunala avbjóðingin við, at ferðastreymurin serliga til hesar bygdir er, umframt gjøgnumkoyring í Hvalvík, Langasandi og Haldórsvík, at herberga øllum bilum og bussum sum koma út á smáplássini.
Sunda kommuna hevur brúkt seinastu árini yvir 10 mió.kr. einans at taka móti ferðavinnuni við leigubilum, ferðamannabussum og Camping bilum. Tað eru íløgur til keyp av lendi, trý parkeringsøkið í Saksun, parkeringsøkið í Tjørnuvík við parkeingssensorum, Campingøkið við Gjógv og í Haldórsvík, skelting, talgildum ferðslukunningum og almennu wc'ini fyri at nevna tey kostnaðartungu.
Samstundis eru ongar almennar farleiðir við SSL til Saksunar, næstan ongar til Gjáar og fáar til Tjørnuvíkar.
Felags fyri hesar túrar er, at ferðafólkatalið við almennu SSL farleiðunum er sera sera avmarkað.

Tað hevði hjálpt um fíggjarliga hjá Sunda kommunu, **um gjalds parkering var heimilað okkum**, til lutvíst at kunna fíggja omanfyri íløgur.
Ein annar fíggingarmøguleiki kundi verði, um eitt dagsgjald var lagt á leigubilar í Føroyum umframt bilar og bussar sum koma til Føroya, sum var býtt út á tey góðkendu parkeringsøkið til ferðavinnu.
Ein munandi umskipan av SSL, so koyrdu túrarnir veruliga góðu nyttu til okkum borgarar í Sunda kommunu umframt at møguleiki var fyri at ferðast til stóru ferðavinnumálini við SSL, hevði bøtt og lætt um. Tað er tætt við ógjørligt í dag.

-

Ein avbjóðing við Camping bilum er, at tey gista á parkerings økjum uttanfyri okkara dagstovnar, skúlar og bygdarhús, enn tá í teimum stóru busslummunum ætlaðum til leið 400. Hendan avbjóðing kundi verði loyst við, at allir Camping bilar skulu keypa atgongumerkið til okkara góðkendu kampingpláss til hvørt døgn teir eru í Føroyum, áðrenn teir koma til Føroya. Síðan kundu teir aktiverað hesi atgongumerkið á Camping plássunum, sum so fekk peningin fyri skrásetingina. Um atgongumerkini ikki vóru brúkt, hevði tað eitt eyka gjald við sær, sum sjálvvirkandi var trekt tá farið var av landinum aftur.

-

Ein meira óbeinleiðis avbjóðing ferðavinnan hevur við sær fyri Sunda kommunu, eru fritíðarbústaðir.
Einans í Sunda kommunu eru 150-200 fritíðarbústaðir. Tað hevur verðið tosað nógv um stórkapitalin í Føroyum, men tað vit striðast við er kapitalurin millum okkum føroyingar. Tað eru vit føroyingar sum keypa okkum fritíðarbústaðir, og hava veruliga lagt trýst á smáu lokalsamfeløgini. Taka vit við Gjógv, standa yvir 70 fritíðarbústaðir, sum fólk hava búð í ella kunnu búgva í. Fólkatalið við Gjógv er lækkað yvir 80% síðan miðskeiðis í 60'inum hóast at húsatalið er økt munandi. Miðalaldurin við Gjógv er høgur og møguleikin hjá eini

ungari familju at festa røtur undir egnum takið sjálvi, er millum lítil og eingin. Hetta tí, at munurin millum marknaðarprís á frítíðarbústaðnum og tí ein peningastovnur letur fígging til á smáplássum er so stórur, at ungafamiljan skal hava upp í milliónir í eginfígging fyri at kunna búsetast til dømis við Gjógv. Sama ger seg galdandi í Tjørnuvík, í Saksun, og tað byrja at síggjast í Haldórsvík eisini.
Sunda kommuna, og skattgjaldarar í Sunda kommunu, rinda allan rakstrarkostnað til allar kommunalar veitingar til hesar frítíðarbústaðir, uttan at tann sum eigur luttekur á annan hátt enn at móttaka og í øðrum førum at krevja.

Avleiðingin fyri Sunda kommunu er tann, vit eru færri skattgjaldarar per hús at rinda fyri grundleggjandi kommunalar tænastur á smáplássum við nógvum frítíðarbústøðum.
Tað er trupult at gerast bygdaborgari og partur av lokalsamfelagnum á smáplássum. Lokalsamfelagið við Gjógv er undir stórum trýsti. Sannlíkindini fyri, at lokalsamfelagið gerst upp aftur minni ella hvørvur heilt er til staðar.
Hetta kann loysast við, at Sunda kommuna fær amboð til at ávirkað bústaðarmarknaðin. Tað kundi verði heimild at tikið tænastugjøld fyri frítíðarbústaðir, kravt bústaðarskyldu fyri at tryggja at ávís lokalsamfeløg hava betri tilverumøguleika.
Í ferðavinnu høpi fylgir TAKS væl við, so at útleigan av frítíðarbústaði umvegin AirBnB, Booking.com, Kunningarstovur v.m. verður skrásetast sum inntøka, oftast sum b-inntøka hjá eigara. Um kommunuskatturin av hesi útleigan fall til kommununa við frítíðarbústaðnum og ikki til kommununa har eigarin býr, kundi tað verði ein munandi fíggjarligur bati, serliga til smáu bygdasamfeløgini í Føroyum.

Hetta er lutvíst í samgonguskjalinum, og eri eg og onnur beinleiðis ótolin, til avvarandi Landsstýrisfólk byrjar hetta arbeiði, tí fyri okkum í Sunda kommunu hevur tað skund!

Vit síggja, at í 2021 vóru skrásett næstan 1500 frítíðarbústaðir uttan fyri Tórshavnar kommunu. Um kommunalu amboðini at ávirkað bústaðarmarknaðin kundu virka til, at 9. hvør frítíðarbústaður gjørdist bústaður, hevði tað verði eins nógv sum teir 168 bústaðir, felagið Bústaðir hevur megna at bygt uttanfyri Tórshavnar kommunu síðan 2012. Tað hevði lætt um trýstið á bústaðartrýstið so at siga beinan vegin, og útboðið av bústøðum hevði verði økt, serliga úti um landið.

Vinarliga

Jógvan Kruse
Borgarstjóri

+298228844
jogvan@sunda.fo

Tú kanst lesa meira um datuverndarpolitikkin hjá okkum á

LM-099/2023

Sunda kommuna
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki

Tlf. 66 72 71
www.sunda.fo

